Bjarni Askham Bjarnason

Fra: Leif Abrahamsen
Sendt: mikudagur, 14. februar 2024 07:36
Til: Fíggjarmálaráðið; Bjarni Askham Bjarnason; Bára Michelsen
Cc: Durita Tausen; Nicolai Mohr Balle; Dávur Johannesen; Oddbjørg Poulsen
Emne: Viðmerkingar til hoyringsskriv til uppskot til løgtingslóg um heildarætlan fyri Kjarnuna

Til Fíggjarmálaráðið

Gjaldstovan hevur fingið uppskot dagfest 25. januar 2024 til løgtingslóg um heildarætlan fyri Kjarnuna til hoyringar.

Alment kunnu vit bara fegnast um, at henda fyri samfelagið so týdningarmikla skipanin, verður dagførd. Herfrá skulu vera øll góð ynski á leiðini við hesi verkætlanini.

Visiónin og strategiin fyri Kjarnuna
Talan er um eina verkætlan, við óvissum, metta til 150 mió. kr., tá skal verða havt í huga, at grunnar ikki eru við. Talan er tí um Føroya størsta einkultu kt-verkætlan. Í verkætlanaruppskotinum er verkætlanin grundfest internt á TAKS. Vit síggja ikki, at samfelagið í síni heild verður tikið við í verkætlanina, sum vit høvdu t.d. við Talgildu Føroyum. Gjaldstovan heldur tí, at tá ið man brúkar so nógvar pengar, so átti verkætlanin eisini at tikið við at hugsa tingini av nýggjum, tí skipanin byggir á hugskot og eitt støði, sum er fleiri áratíggju. T.d. átti skipanin at verið hugsað at handfara brúkaragjøld hjá landi og kommunum. Skulu bankarnir vera so sentralir, tá ið ein løn verður útgoldin, og hvussu sær ein framtíðar skattaskipan út, kundi verið áhugavert at lýst út frá einum meira eksternum innovativum og búskaparligum sjónarhorni, nú vit skulu hugsa 40 ár inn í framtíðina.

Leiklutur Gjaldstovunnar í dag:
Gjaldstovan hevur nógv markamót við TAKS og harvið Kjarnuna:

- Skipanirnar hjá TAKS flyta dátur til BSL. BSL fevnir yvir tann sanna roknskapin
- Skipanirnar hjá TAKS rinda út um Útjaldsskipanina
- Inngjaldsskipanin hjá Gjaldstovuni er integrerað við TAKS-skipanirnar
- Allar búskapardátur, sum hava við kommunur at gera, fer yvir Kommunuavrokningina.
- Borgarar rita seg inn á borgara- og vinnuglugga við Samleikanum
- Virkið er tætt integrerað við TAKS
- Virkisvangin hevur eisini tætt markamót við TAKS
- Vangin, sum er staðið, har almennir stovnar samskifta við borgaran
- Heldin, sum er kt-samskiftispallur hjá landinum, sum TAKS skal brúka
- Frítíðargrunnar. Ein stórur partur av bókhaldinum eru allar transaktiónirnar, sum frítíðargrunnar skapa
- Landsnet er kt-rakstrarpallurin hjá landinum, og eisini TAKS
- AD hjá Landsneti skal vera innritingin í Kjarnuna. Allir almennir stovnar liggja inni í AD, tí skal hetta samskipast væl, hvat leikuturin hjá Landsnet AD er.
- Lønarskipan hjá landinum, sum er grundarlagið undir 1/3 av øllum lønarútgjaldinum í Føroyum, herundir integratión til barsilsskipan.

Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovan skal góðkenna egnar búskaparskipanir, her er talan um eina egna búskaparskipan burturav. Royndir hava víst, at tað er vónleyst at koma inn í endanum í eini verkætlan og skulu góðkenna eina skipan.

Gjaldstovan ger landsroknskapin og skal tryggja, at tær dátur, sum eru grundarlagið undir roknskapinum, verða tiknar rætt við, tí er hetta eisini ein týdningarmikil partur at loysa leypandi.

Vit kunnu nevna, at Gjaldstovan er í gongd við at menna eina nýggja høvuðsbók, og tað vildi verið rættiliga upplagt, at henda var integrerað við nýggju loysnirnar, og at man brúkti somu hugtøk. Taks hevur t.d. havt eina aðra kontuskipan, sum í áratíggju hava skapt forvirring og nógvar feilir millum skipanirnar hjá Taks og Gjaldstovuni. Vit hava eisini stórar avbjóðingar við vantandi tíðaravmarkingum og ófullkomnum transaktiónsslóðum.

Bara eitt sovorði lítið ting, sum býtið millum land og kommunur - sum er ein blacbox fyri øll uttanfyri Taks - eigur hetta ikki at verið hugsað øðrvísi?

Yvirskipað er støða tikin til, at tað almenna brúkar Vangan til at samskifta mótvegis borgararunum, er hetta partur av verkætlanini? Do Virkisvangin.

Gjaldstovan hevur eitt sindur ringt við at síggja, hvar øll hesi markamótini verða loyst í viðlagda tilfari. Gjaldstovubókhald verður nevnt, men her er so nógv meira enn bókhald. Hesi viðurskifti fella heldur ikki upp á pláss eftir nøkrum døgum í 2026, har gjaldstovubókhaldið verður nevnt, men alt omanfyri er leypandi partur av øllum partsverkætlanunum.

Bygnaður:
Av tí, at Gjaldstovan er meira ella minni inni alla staðni, mæla vit til, at Gjaldstovan verður ein meira formaliseraður partur av bygnaðinum, so vit tryggja, at koblingspunktini, sum Gjaldstovan hevur, verða tikin við frá byrjan.

Eitt heilt samfelag er rundan um nýggju Kjarnuna – vinna og borgarar – sum eiga at vera tikin við, tí loysnin kemur at ávirka øll.

Vit halda eisini, at eigarabólkurin eigur at taka sær av, at ekstern áhugamál verða umboðað, og hava neyðugar heimildir at taka strategiskar avgerðir hesum viðvíkjandi.

Tað eiga at verða knýttir ráðgevarabólkar til eigarabólkin:

- Ein bólkur, sum umboðar áhugamálini hjá týðandi aktørum
- Ein bólkur, sum umboðar serfrøði innan innovatión, tøkni og búskaparfrøði o.tíl.

GJALDSTOVAN

Leif Abrahamsen

Stjóri / CEO

TELEFON +298 352400 | BEINLEIÐIS +298 214660

www.gjaldstovan.fo